## VIÐMERKINGAR

# Pinnamatar-brigadan



Arnstein Niclasen

Undir gumpinum á tí útlendska **leigusveinunum** - (hevur ikki onkur hoyrt hetta hugtakið: "leigusveinur" fyrr í sambandi við 7. stjórnarkreppu sjálvstýrislandsstýrismanna?) - har liggur pinnamatar-brigadan trygt í læ aftan fyri ta kendu Finn-Norman-Christensen-doktrinina.

### Maktin og æran á flogi

Og har henda eingi óráð. Tí maktin er hjá brigaduni. Fyrisitingarliga - og tí eisini tann politiska. Soleiðis er skipanin bara. **Bestilt** m. a. av núverandi løgtingsformanni og verandi formanni í fiskimannafelagnum og verandi løgmanni. Sum tá í tøkum tíma vóru hóskandi høgt upp á strá í landsstýrismanningini í Tinganesi.

Brigadan er vituliga ikki at hitta. Og hevur einki alment at siga. Onga meining um nakað. Í øllum førum ikki til tað vanliga fólkið. Tó gevur brigadan síni duldu ráð - í tí dulda. Men einki ljóð hoyrist. Soleiðis skal tað vera.

Tí brigadan er altíð á fundi. Í ørgrynni av bólkum, ráðum og nevndum. Ad hoc ella fyri well. Ella eisini á flogi. "Í øllum londum í eyst og vest, men **ikki** í Føroyum, mær dámar best," kundi sangurin heldur ljóðað. Til mikla gleði fyri avlopið hjá Magna á Atlantsflogi. Tí telda, fax, frímerki ella telefon finnast heldur ikki í Tinganesi.

### Eftirmetingar

Ella er brigadan á seminari. Hon ger eftirmetingar og eftirmetingar av eftirmetingum. Tó ikki av alivinnuni. Nei, fy við henni. Tað kennist alt ov keðiligt. Vit hava tað jú so hyggeligt. Tað er ov smátt fyri stórar heilar. Og so var alingin bara ein triðingur av fíggjarlóg landsins(!).

Ja, og so er eisini brigadan støðugt undir útbúgving. Og tað má treingja til. Soleiðis at festa hár á beran skalla. "Workshop", eitur eitt ítriv, vælsignað. Nær hevur Palleba verið á workshop? Helst líka so oftani sum Kalle Katt, lukka -.

### Hvør stýrir?

Ein brigaduførari eitur løgmansstjórin. Áhugavert navn. Tí løgkonustjóri hevði ljóða heldur løggut. Eisini í hesum líkarættardøgum. Navnið er skiljandi fyri okkum vanligu veljarar, sum einki vita og enn minni frætta. Ein stjóri er jú tann, sambært tí einfaldu mállæruna í tí strátakta barnaskúlanum, sum stýrir einum bili, skrivstovu, kiosk ella tarvafelag. Tað vita jú øll. Um løgmansstjórin stýrir løgmanni av fanginum ella á halakukk -. Ja, tað kundi verið vert at vita.

So har er einki at koma eftir. Løgmannastjórarinnan stýrir. Kósin verður sjálvsagt løgd á samhaldsføstum ráðsmóti millum aðalstjórarnar "in one's own good time" á lukkaðum fundi. Einki hoyrist heldur haðani, og tó varð hurðin ein morgun gloppað so mikið fyri tí disko-ferma og meinaleysa Elis í útvarpinum, hetta: "Jú, vit drekka vatn á morgni og kaffe klokkan 10". So vita vit tað. Einki varð tó nevnt um, um restin av degnum fór til at blanda eitur fyri farligar ella fiktivar fíggindar.

### Er løgmaður tryggur við lagið?

Og skuldi løgmaður sagt nakað býtt, eftir tilráðing aðal-brigadunar, so rýkur hann kanska bara út, men brigadan heldur fram. Stabiliteturin er í lagi, sjálvandi. Haðani rýkur eingin út. Tað skuldi bara manglað.

Tí hetta hevur Finn Normann sligið fast, og er anbefallað av júst teimum, sum eftirsíðani hava mannað brigaduna, og alt samalt er síðani væl og virðiliga samtykt av teimum politiskt valdu - næstan sum í ørviti.

So hetta hava løgtingsmenn gott av. Og eru teir ónøgdir. So skulu teir bara lata skuffuna aftur. Sum teir eisini gera. Men man tímin ikki vera komin, til at gera eina tørvandi eftirmeting av 10 ára vandasigling við høgum hýrum, og við støðugum halli á fíggjarlóg landsins seinastu árini?

Her mátti tó nógv verðið at spart. Men, nei, so heldur lirka ein hálvkaldan døgverða frá teim gomlu og niðurslitnu. Tí tey eru ikki so farlig. Og hví skulu tey hava nakað at eta? Tey nytta einki allíkavæl! (Tó haldi eg - í sannleikans áhuga - at landsstýrismaðurin **ikki** vitsti av hesum lokabragdinum, men brigadan....!)

### Ja, svá hittast Høvdingar

Og tó, og tó! Onkuntíð er brigadan at hitta. Tá eru øll heima. Og tað er, táið onkur teirra fyllir runt ella hevur jubileum ella hevur okkurt annað er á bananum fyri tað betra slagið, sum er vert at feira - og fyri almenna rokning. Tá møtast tey øll, og tá er einki óført.

"Ein lítlan til mín, ein spískan til tín, tað riggar so væl...(!)", nakað soleiðis syngur troubadururin Kári P. onkustaðni. Ja, pinnamat, rækjur, øður, kalt og fløtt borð, bløðandi tournedos og brúnkaður búffur...... alle tiders! Við SvF í litum á blettinum. Og væl er, at so er.

Og so verður farið upp á gólv: Jomfrúgvin Marita, neyðardýrið - ikki at forgloyma - verður hálað út úr aftur nunnukleystrinum at dansa við. Vangan niður á øksluna. Tá sær ein ordiliga skrappur út. Sjálvt brigadan dugir niðurlagið væl. Tað er gott. Tí heilin skal helst ikki yviranstrengast, soleiðsni. Og so dansar kongressin og jublar brigadan alla ta ljósu tíðina á árinum- -!

### Brigadan og tann breiða samgongan

Men er so Landsstýrið púra handlingslammað og Løgtingið til tað turra undirhald? Tí samgongan er so breið, so breið at hon valla veit, hvat ið vendir upp ella niður. Og vit vanligu veljarar skulu bara halda tátt, tí vit hava valt samgonguna. Gott nokk ikki beinleiðis, tí vit hava óbeinleiðis representativt demokrati! So kom ikki her --.(Men hava vit valt brigaduna? ).

### Spurningar eftirburðarins

Men eftir standa tó hesir spurningarnir fyri hvønn Kalla Katt og Palla Platt:" Varð **Finn Normann** sendur ella bestiltur til Føroya fyri at fremja eina ovurdýra og yvirfylta komandobrúgv av maktsperdum ódugnakroppum, soleiðis at føroyska skútan gjørdist bedøvandi óstabil í vaggandi politiska menningargjálvinum?

Og varð Richard Mikkelsen sendur higar upp fyri at lemja búskap landsins fyri well?? Og var alt hetta planlagt á teim bonaðu gólvunum, helst **áðrenn Ríkisumboðsmaðurin** á ólavsøku streyk páfuglafjaðrahattin og sendi búnan hjá lord Nelson og svørið, Skræp, á museum?

Vit spyrja bara. Tí danir brúka sjálvir bara topp-professionellar úrmælingar á ovastu rók, meðan brigadan - - - (á ja, tú forbarmandi!) Ella er støða teirra fólkavaldu bara hóskandi "laissez faire", nakað sum tær súrligu næturnar í Keypmannahavn: "Jú, tað riggar so væl, tá ið ein biður teg - lova sær - at sova sær - hjá tær - -", sum skaldið syngur.

### Men, pressan -

Men alt hetta fáa vit sjálvsagt at vita, um nakar er, sum klemmar kokubotnin. Tí vit hava - til alt held - eina fríða og fría og "garvaða" pressu við hóskandi hárhvassari public-service ábyrgd, ella hvussu? (Nústaðni rakni eg við). Ella er hon kanska við í brigaduni? Ja, hvør veit?

# Føroyar í løtuni. Eitt kvøld.

Tórir Mikkelsen

Siti við borðið við telduna. Kaffikoppurin er fyltur, við heitum kaffi og alt koyrir. Havi verið so heppin at funnið eina heimasíðu har rithøvundurin leggur eina beinharða linju ímóti tí amerikonsku fastfood mentanini við alt sum tað inniber. Maðurin, ið er amerikanari, er meira umtóktur enn tær flestu leiti vevsíðurnar og er rættuliga umstríddur. Málið er at rykkja í tey smáborgaraligur og fordómar og við kynismu og sjálvsálit svarar hann teldupost frá fólki, ið eru uppøst inn á hann.

Havi hugsað um tann stóra munin á eystur og vestur í U.S.A. Tildømis er New York sera áhugavert fyri okkum evropearum. Fert tú harafturímótur longur inn í landið, dettur tú á tey mest einfaldu og fanatisku fólkini, ið fær bumbumennirnar í London at lýkjast barnalótum. Hetta eru fólk, sum "the hamish" fyri at taka eina cliché og høgrasinnað fólk í tann grad. Um tú fert vesturum, so er San Franciso býurin við Silicon Valley og Hollywood við øllum tí undrunurarsama og frílynta sum ein primus motur. Beiggi hevur vitjað New York og Washington og greiddi mær frá at, fólk eru fitt og fyrikomandi og ja... heilt øðrvísi enn myndirnar sum vit fáa potað í okkum

Ein og U.S.A eru vit rættuliga fjølltáttað, ymsk og tankarnir flúgva, hugsi at nú fara núgvar kollveltingar frá í Føroyum. Tað prutlar undir lokinum. Ungdómurin *Vit* eru vorðin troytt av tað stirvna og keðiliga, sex er vorðið gerandis tos og allataðni fáa vit tilboð blakað í nakkan, keyp hettar, keyp hattar. Føroyar er tann mest socialistiski staturin í heiminum, har landið eigur eini 80 procent av allar ognir. Nógv kleyrað seg upp at einum krisindómi fyri at halda sær yvir vatnskorpuni. Hini eru líka leyslætin (promiskuløs) at eldri fólk ikki skilja ungdómin. Ikki tí, okkara eldru eru líka rótleys sum vit, frá trýssjuni og uppeftir havi tey roynt at fóta sær. Pápi sigur onkuntíð tað beinrakið. Eg minnist tá ið hann segði, at nútíðin minnir um rænesansuna, vit koma úr tí myrku 19'indu øld og inn í eina øld við tveimum heimsbardøgum og slóðbrótandi nýhugsanir.

Fái mær ein mun. *Ahh doyligt kaffi*, tað má til.

Eg fílist ofta á føroyingar, at vit eru so stivrnir, men havi funnið útav, at tað eri eg, ið eri stirvin. Eg hevði verið niðri í Danmark ein mánað og kom aftur til ólavsøkuna. Var so errin at man hevði verið á Roskilde festival. Men hvat - helvtin av ungdóminum kundi vísa á festivalbandið, meinlíkt mínum.

Hóast hetta haldi eg, at vit kundu verið meira opin og erlig og sanna at t. d. regatta er ein stór øl veiðsla, at G! er fyri tey ungu og Summarfestivalurin fyri hini, at vit eru eitt ótrúliga frammkomin fólk, at Javnaraflokkurin er eitt partí av einkisigarum, eitt fólk, ið bert vil hava vald at hugna sær við og meini so við EFTA? Hvat er tað, ein avoldaður felagsskapur. Í mínari verð er hetta embætismisnýsla av tí grovasta, at hava eitt løgting fylt við gomlum skiparum og skúlalærarum, hetta hoyrir fortíðini til. Hvar eru allir akademikararnir?

Anyway, skal á G! Tað umboðar alt ið føroyingar standa fyri.

Var har ikki í ár, men hoyrdi, at alt var "super mega feitt", havi verið á nakrar festivalar og tað eru tær lítlu detaljurnar ið gera munin. Klemmarir! tað ljótar well.

Vil til síðst viðmerkja at eg har lisið Deyðin sendur apríl og saman við Oddvør Johansen, eru hesir rithøvundar teir einastu sum eg tími at lesa beint í løtuni. Havi hug at fýlast á Kim Simonsen. Kim hevur lisið niðri og hetta er fínasta slag, men skal hann citera hvønn rithøvund, ið hann lesur?

Innihald er fyri tað mesta møsn, hann stiðjar seg upp at einum gomlum sjónarmiði og skal per definitión seta hvønn føroying í bás. Eingin veit rættuliga, hvør tann føroyski veruleikin er. Havi sjálvur hug at flenna tá eg síggi tey borgarligu ganga og mala á ólavsøku í føroyskum klæðum nikkandi og brosandi, ein falskur veruleiki í mínum eygum, gev mær heldur G!